# So skal krossurin setast







**Valstríðið hevur verið stutt, men stundum hevur leikað har á millum teir ymsu flokkarnar, ið vilja ogna sær sessirnar á Fólkatingi. Nú skal veljarin so seta sín kross og gera av, hvør skal umboða Føroyar á Christiansborg**

FÓLKATINGSVAL
*Stefan í Skorini*

Veljarin hevur altíð seinasta orðið, tá fólkavaldu umboð okkara bjóða seg fram at stýra landi – í hesum førinum er tað ríkið.

Myndamaður okkara var týsmorgunin uppi í ítróttarhøllini á Hálsi, har havnarfólk skulu greiða atkvøðu.

Sagt varð av Hálsi, at fleiri fólk høvdu verið á vali á middegi týsdagin enn um somu tíð við seinasta val. 1720 fólk høvdu greitt atkvøðu á middegi, og hetta er væl meira enn vanligt.

Veljarakanningarnar hava víst, at Tjóðveldisflokkurin fær fyrsta umboðið, og at Sambandsflokkurin fær tað næsta umboðið inn á Fólkating. Verri stendur til hjá Fólkaflokkinum og Javnaðarflokkinum, sum sambært veljarakanningum missa síni umboð.

Tó er einki avgjørt fyrr enn atkvøðurnar eru taldar, tí onkuntíð hevur tað víst seg, at veljarakanningarnar hava verið skeivar.

Í Danmark er lítil ivi millum valgranskarar um, at Anders Fogh Rasmussen fer at vinna valið, so at Danmark fer at vera stýrt av eini borgarligari stjórn komandi fýra árini.

Valstríðið hevur verið hart, og mikil orðadráttur hevur verið millum tey ymsu valevnini. Í dag skal veljarin siga sína hugsan.










Heðin Mortensen:

# Býráðið heldur orð

**Heðin Mortensen, formaðurin í mentamálanevndini, vísir aftur, at býráðið hevur brotið nakað lyfti um barnaansing. Hann vísir á, at samgongan fer at loysa trupulleikan í hesum valskeiðnum**

BARNAANSING
*Stefan í Skorini*

Í Sosialinum leygardagin var grein um barnaansing í Tórshavnar kommunu. Fyri einum ári síðani samtykti táverandi býráð einmælt, at tørvurin á barnaansing skuldi nøktast í ár 2003. Hetta var beint fyri valið.

Í viðmerkingum til fíggjarlógina fyri næsta ár stendur, at býráðið ikki ætlar at nøkta henda tørvin til fulnar fyrr enn í 2005 ella 2006. Minnilutin í býráðnum metti, at hetta var at bróta tað lyftið, ið býráðið hevði givið fyri einum ári síðani.

Formaðurin í Foreldrafelagnum talaði eisini at og segði, at felagið als ikki hevði álit á politikarum, tá teir siga seg vilja nøkta tørvin á ansingarplássum. Felagið vísti á, at tá stovnarnir eru bygdir og tørvurin nøktaður, so skulu tey trúgva lyftum býráðsins.



*Heðin Mortensen vísir aftur, at býráðið hevur brotið nakað lyfti um barnaansing. Trupulleikar hava verið við byggingini av tveimum stovnum, og tí er tíðarætlanin eitt sindur forskotin*

### Í hesum valskeiðnum

Heðin Mortensen er formaður í mentamálanevndini, ið hevur barnaansing um hendi. Hann undrast á ta niðurstøðu, sum minnilutin er komin fram til í hesum máli. Hann vísir á, at upprunaliga tíðarætlanin hjá býráðnum á hesum økinum er forskotin í nakrar mánaðir. Hann vísir tó aftur, at býráðið hevur brotið nakað lyfti, og at tað fer at arbeiða fyri at nøkta tørvin á ansingarplássum í hesum valskeiðnum.

– At nøkta tørvin í ár 2003 er órealistiskt, men vit fara tó at loysa málið í hesum valskeiðnum. Hetta er ikki ein trupulleiki hjá samgonguni, sigur Heðin Mortensen.

Hann vísir á, at tíðarætlanin er eitt sindur forskotin. Hetta kemst av, at trupulleikar hava tikið seg í sambandi við byggingina av tveimum stovnum. Hesir stovnar eru tí bodnir út av nýggjum.

Ætlanin var, at tveir stovnar skuldu vera lidnir í apríl næsta ár, men hetta verður nú ikki fyrr enn í november. Heðin Mortensen sigur, at tíðarætlanin við hesum stovnunum skal ikki broytast aftur.

Hesi báðir stovnar fara at hava pláss fyri 120 børn tilsamans, og tað minkar nakað um bíðilistan.

– Vit hava sett okkum sum mál at loysa henda trupulleikan í hesum valskeiðnum, og vit arbeiða miðvíst fram ímóti hesum. Tað er ein spurningur um vilja hjá okkum politikarum, sigur Heðin Mortensen, ið leggur afturat, at Foreldrafelagið ikki hevur nakra orsøk at stúra fyri, at býráðið fer at bróta tað lyftið, ið varð givið fyri einum ári síðani.

Býráðið hevur játtað nærum 100 milliónir krónur til barnaansing á komandi fíggjarlóg, sum enn bara hevur verið til fyrstu viðgerð.

# Skifti í Danmark

**Seinnapartin valdagin bendi alt á, at valið í Danmark verður søguligt**

ÚTLAND:

Valhølini í Danmark høvdu ikki meira enn latið dyrnar upp, tá valgranskarar og onnur fóru at tosa um, at hetta helst fór at gerast eitt søguligt val.

Tann seinasta veljarakanningin, sum danska útvarpið kunngjørdi, vísti, at teir borgarligu flokkarnir fóru at fáa 99 tinglimir, meðan stjórnarflokkarnir og teirra stuðulsflokkar fóru at fáa 76.

Hendan kanningin gav Vinstra 32 prosent av atkvøðunum og Sosialdemokratunum 29 prosent.

Eitt er, at kanningin gav Vinstra tað besta valið nakrantíð, men hon bendi samstundis á, at Vinstra fyri fyrstu ferð síðani 1920 gjørdist størri ann Sosialdemokratarnir.

Helt kanningin, er tað eisini fyrstu ferð í langa tíð, at CD og Teir Radikalu ikki eru tungan á vágskálini og kunnu gera av, hvør av teimum báðum stóru flokkunum skipar stjórn. Annars vísti tann seinasta kanningin, at CD misti sína umboðan í Fólkatinginum.

### Bjarnatænasta

Tey bæði forsætisráðharraevnini, Poul Nyrup Rasmussen og Anders Fogh Rasmussen, vóru varnir í gjár. Forsætisráðharrin vildi sleppa at bíða eftir úrslitinum, og Vinstraformaðurin segði av ringum royndum, at valið var ikki avgjørt, fyrr enn tann seinasti veljarin hevði sett krossin.

Seinastu dagarnar hevur nógv verið tosað um, at fimti hvør veljari í Danmark tekur ikki avgerð fyrr enn sjálvan valdagin. Á valinum fyri fýra árum síðani vísti tað seg, at Sosialdemokratarnir áttu meginpartin av teimum ivandi veljarunum, men soleiðis var ikki hesaferð. Nú var býtið munandi javnari.

Í gjár kom eisini fram, at Sosialdemokratarnir eisini stóðu til stóra afturgongd á kommunuvalinum. Politisku eygleiðararnir halda, at valstríðið upp undir fólkatingsvalið hevur ávirkað tað kommunala valstríðið so nógv, at tey flestu nú velja sama flokk til Fólkating og býráð.

Avgerðin hjá forsætisráðharranum at hava fólkatingsvalið sama dag sum kommunuvalið kann sostatt hava verið flokki hansara ein bjarnatænasta.

*Fartekst*

# Fongslað í fýra vikur

**Tey bæði fólkini, ið mánadagin vórðu tikin við 5 kilo av hassji í bilinum, eru varðhaldsfongslað í fýra vikur, meðan løgreglan kannar málið**

HASSJ
*Stefan í Skorini*

Rætturin avgjørdi í gjár, at tey bæði verða varðhaldsfongslað í fýra vikur. Talan er um eina 19 ára gamla kvinnu og ein 31 ára gamlan mann. Tey eru bæði danir og hava fastan bústað í Danmark. Tvær tær fyrstu vikurnar eru tey avbyrgd, so at tey ikki hava samband við hvønnannan ella nakran uttanfyri fongslið.

Hetta verður gjørt, tí løgreglan væntar, at onkur annar persónur er við í leikinum. Tey skulu tí ikki hava møguleika at ávirka tey bæði, ið eru fongslaði.

Komandi fýra vikurnar fer løgreglan so at kanna málið, og tá kemur málið væntandi fyri í rættinum. Revsingin kann vera upp til tvey ára fongsling. Hetta veldst eitt sindur um nøgdina, og um tey hava verið við í kriminaliteti fyrr. Tey bæði nokta seg sek í lógarbrotinum.

Hassjið varð funnið í eykahjólinum, ið hekk undir bilinum. Tollvaldið sigur, at tollararnir sóu á hundinum, at ikki alt ruggaði rætt. Tí varð bilurin tikin til viks og kannaður gjølla.

Fimm kilo av hassji er ein stór nøgd, og nógv tann størsta, ið er funnin í ár. Virðið á gøtuni er 625.000 krónur.

